## Andstøðkvinnur tiknar

Løgreglan í Kuba handtók í gjár nakrar kvinnur, sum gingu mótmælisgongu í høvuðsstaðnum Havana. Kvinnurnar eru limir í einum felagsskapi, sum avvarandi hjá politiskum fangum hava skipað. Eygnavitni greiddu frá, at kvinnurnar vórðu tiknar, stutt eftir at tær høvdu verið til eina guðstænastu til minnis um andstøðumannin Orlando Zapata, sum svøltaði seg í hel í einum fongsli í síðsta mánað. Kvinnurnar ætla at skipa fyri mótmælum seinni í vikuni til minnis um, at sjey ár eru liðin, síðani 75 andstøðingar vórðu dømdir drúgva fongsulsrevsing.



## Ágangandi tiltøk

USA vil hava nøkur verulig og ágangandi tiltøk ímóti Iran fyri at forða landinum at fáa sær kjarnorkuvápn og fyri at forða einari kjarnorkuvápnadubbing í Miðeystri. Tað segði Barack Obama, forseti, í gjárkvøldið. Hann segði, at iranska stjórnin tykist leggja størri dent á at sýta fólkinum demokratisk rættindi heldur enn at loysa álvarsmálið um landsins kjarnorkuætlanir. Tí er neyðugt við tiltøkum, sum muna, segði Obama og legði afturat, at allir møguleikar standa opnir. Amerikanskir embætismenn søgdu fyrr í vikuni, at Iran tykist ikki hava skund við kjarnorkuætlanunum í løtuni.



*Kinna Poulsen hevur givið ungu listakvinnuni Haldis Olsen heiðurspláss millum Torbjørn Olsen til vinstru og Tórodd Poulsen til høgru*



*Autentiska dokumentið hjá Rannvá Kunoy er gjørt úr hópframleiddum kopipappíri*

# Millum blóð og popp

**Tað prutlar av týdningum undir reyð/svørtu yvirflátuni á Steinprent, har blóðugur álvari spríkir út millum hópframleiddar flatur**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Sjálvt drykkirnir vóru svartir og reyðir, tá framsýningin »Svart og Reytt« læt upp í Steinprent á Grækarismessu herfyri. Víst stavaði serliga lithugskotið frá okkara Tjóðfugli, men við tveimum teimum grafiskt sterkastu litunum, er henda framsýningin av steinprentum og koparprentum sjónligt dømi um ta heilt serligu megina í grafisku tøknini, sigur Kinna Poulsen, listaummælari, ið hevur valt listaverkini og skipað framsýningina.

Ellivu listafólk eru við á framsýningini, og í fleiri førum er tað næstan sum at síggja tey fyri fyrstu ferð, nú tey hava skulað avmarkað seg til tveir ávísar litir. Í aðrar mátar er framsýningin eisini ein ferð gjøgnum føroyska list bæði í tíð og rúmi.

### Djúpt og einfalt

Á langa vegginum niðaneftir hava tríggjar smáar myndir hjá Haldis Olsen fingið eitt serligt pláss ímillum tvey stór verk eftir Tórbjørn Olsen og Tóroddur Poulsen. Plássið er ikki bara valt fyri at geva ungu listakvinnuni tann heiður, hon hevur uppiborið sambært Kinnu Poulsen, men eisini tí hennara verk líkjast fullkomiliga frá teimum báðum meir etableraðu listamonnunum við síðuna av.

Við sínum religiøsa myndevni peikar myndin hjá Tórbjørn Olsen aftureftir í onkran mun listarliga, meðan myndin hjá Tóroddi Poulsen er eitt høvuðsverk í føroyskari samtíðarlist. Myndirnar hjá Haldis Olsen peika hinvegin í allar mátar frameftir við sínum heilt øðrvísi og nýggja perspektivi.



*Lívsins landslag – hesuferð í blóðreyðum hjá Tróndi Patursyni*

– Tað sermerkta við Haldis Olsen er, at hon ofta tekur eitt organiskt og »heilskapað« myndevni, sum til dømis eina kúgv og sker myndina á ein hátt, sum deformerar kúnna og harvið forskjýtur okkara fatan av henni fullkomiliga. Hetta er nakað, vit serliga síggja millum ungu listafólkini og sum er rættiliga spennandi, sigur Kinna Poulsen.

Millum hini ungu listafólkini á framsýningini síggja vit til dømis eitt reyðlitt verk hjá Rannvá Kunoy. Í gjøgnumskygdu reyðu flatuni hómast eitt miðskipað mest sum strálandi umhvarv av einum krossi, sum flytur tankarnar yvir á okkurt religiøst.

Við fyrsta eygnabrá fært tú kenslu av, at her er okkurt ómetaliga týdningarmikið uppá spæl.

– Slitna úttrykkið fær teg at hugsa um eitt aggamalt dokument ella okkurt autentiskt og upprunaligt. Hyggur tú hinvegin nærri varnast tú, at myndin er sett saman av vanligum, hvítum keðiligum A4 kopiørkum. Tí uppstendur ein heilt nýggjur spenningur millum tað, tú júst helt vera so umráðandi og so tað púra flata og onkisigandi, greiðir Kinna Poulsen frá.

Nakað av tí sama síggja vit í mátanum, Tóroddur Poulsen brúkar endleysu endurgevingarnar av einsháttaðum sluppum.

– Sluppin hevur ein heilt serligan ikonstatus í okkara mentan og søgu. Men endaleysu næstan bevístleysu endurtøkurnar bera brá av hópframleiðslu í stíl við pop-art listina frá »Fabrikkini« hjá Andy Warhol. Aftur her síggja vit andsøgnina millum eina meiningsfulla føroyska fortíð og so okkara poppkent automatiserað. Og tað er tað so allíkavæl nettupp ikki, tí listamaðurin hevur samvitskufult sitið og teknað hvørja einastu av hesum hundraðtals sluppunum við hond.

### Blóðreytt landslag

Á einum øðrum veggi hanga tvær myndir, sum onkursvegna tykjast kendar. Myndirnar eigur Tróndur Patursson, og hansara eyðkendu svørtu kalligrafitekin eru ikki at taka feil av. Hesuferð er ein djúpt reyður litur tó komin í staðin fyri tann eyðkenda bláa, tí reytt kann nakað serligt, sigur Tróndur Patursson og minnir á at:

– Einasta orsøkin til at Mikines málaði grindadráp, var tí so slapp hann at brúka reytt. Reytt hevur eina ótrúliga megi, sum signalerar bæði orku, kærleika, føði og alt tað heilt grundleggjandi og upprunaliga, sigur Tróndur Patursson, sum her manir fram eitt lívsins landslag í blóðreyðum, har hann roynir at náa inn til sálina í náttúruni, sum í grundini eisini er okkara sál, sum hann tekur til.